## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# Á BYGD ELLA Í BÝ

Hann tosaði við stórum stavum, løgmaður, tá hann í síðstu viku gjørdi greitt, at tað kostaði landsstýrisfólkum høvdið, um tey í óðum verku fluttu almennar stovnar, uttan at hetta frammanundan varð avtalað í landsstýrinum.

Hetta segði løgmaður, eftir at øsing hevur verið um, at umsitingin av barsilsskipanini skal flytast av ALS í Havn til Taks á Tvøroyri. Landsstýrismenn hava verið úti og tikið sær heiðurin, annað landsstýrisfólk hevur funnist harðliga at, og stjórin á Taks hevur boðað frá, at hann sjálvur av sínum eintingum hevur tikið hesa avgerð, sum altso ikki er at flyta ein stovn, men at flyta nøkur størv innanhýsis.

Tað skal sjávandi ikki vera nøkur ólukka, at nøkur almenn størv verða løgd uttan fyri Havnina. Sjálvandi ikki tað. Men tað má heldur ikki verða eitt mál í sær sjálvum hjá politikarum at flyta almennar stovnar úr Havnini og út á bygd – bara fyri at flyta teir. Vit kunnu eisini koma í ta støðu, at vit tæga almennu skipanina so nógv í smálutir og spjaða hana so nógv, at púra einki skil verður í. Vit mugu hava eina miðstøð - eisini fyri almennu fyrisitingina, og tann miðstøðin er sjálvsagt høvuðsstaðurin, sum í Føroyum er tað einasta »kraftsentrið«, um vit kunnu kalla tað so. Tað er at blæsa torvmold í eyguni á fólki at billa teimum inn, at vit kunna hava eitt ella tvey kraftsentur afturat, tí tað verður bara eitt.

Í Danmark er tað júst útjaðarapolitikkurin, sum er ein orsøk til, at borgarliga stjórnin seianstu tíggju árini er við at missa fótafestið. Serliga Vinstriflokkurin sær út til at missa nógvar annars trúfastar veljarar av avgerðini um at byggja eitt stórt miðsjúkrahús í Jylland, sum samstundis merkir, at fleiri smærri sjúkrahús verða løgd niður. Úrslitið er, at ein útjaðaraflokkur er stovnaður, sum rættiliga sær út til at fáa vind í seglini – og sum fer at gera, at borgarligu atkvøðurnar fara at spjaðast so nógv, at borgarligi meirilutin á Fólkatingi hvørvur.



Í Føroyum hava vit kanska sterkari útjaðarapolitikarar enn í Danmark. Í øllum førum hava slíkir persónar ofta so stórt vald í politisku flokkunum, at til ber at trýsta ávísar avgerðir ígjøgnum, sum fyri fleiri verða mett sum ørvitisprojekt.

Men vit skulu liva í øllum landinum. Tí er tað av týdningi, at vit duga at meta um, hvørjar tænastur skulu miðsavnast og hvørjar skulu miðfirrast – til gangs fyri okkum øll á besta hátt.

**» Tað eigur ikki at vera eitt mál at flyta stovnar**

# Føroyskir næmingar blivu nummar trý



*Frá vinstru: Jóannes Martin Johannesen, Lillian Gullaksen, Laila Mikkelsen og Vagnur Thomsen*

Fýra næmingar á Tekniska Skúla í Klaksvík hava luttikið í endakappingini í European Business Game, sum var í Limosine í Fraklandi í døgunum 27. juni til 2. juli. Næmingarnir Lilian Gullaksen, Laila Mikkelsen, Jóannes Martin Johannesen og Vagnur Thomsen mannaðu eitt fiktivt virki, sum tey kallaðu North Comfort. Virkið framleiðir hitaskamlar til eldri fólk, og sølan er fyrst og fremst ætla bústovnum.

Luttakandi virkini skulu gera sáttmálar og avtalur við onnur virki um framleiðslu, flutning og sølu. Harafturat skal fígging fáast frá pengastovni. Virkini skulu eisini samskifta við onnur EBG virki uttanlands fyri at skapa sambond ímillum ung úr europeisku londunum.

Næmingarnir á Tekniska Skúla í Klaksvík gjørdist nummar 3 í endakappingini, har 11 lond luttóku, og Danmark bleiv vinnari. Luttakandi londini vóru Danmark, Grønland, Føroyar, England, Skotland, Frakland, Bolzano, Italien, Kroatia, Slovakia og Kekkia.

Umframt næmingarnir vóru Karin Kirke Petersen lærari, Sigmar Jacobsen dómari og Rani Nolsøe NPC (national program coordinator) við í ferðalagnum.



**» Eg elti møguleikan**

ANNIKA SMITH
SÍÐA 6–7



**» Vit raðfesta trygdina høgt**

PETUR JOENSEN
SÍÐA 10



# Nýggjar tíðir í Nólsoy



Nólsoyingar hava um vikuskiftið upplivað nakað, sum teir neyan áður hava upplivað í oynni.

Farnu dagarnar hava bæði ein hýruvognur og ein campingvognur verið í Nólsoy, og tað fekk okkara blaðmann, sum er búsitandi í Nólsoy, at spíla eyguni út og taka myndir.

Flutningurin var hýruvognum, campingvognum og øðrum akførum út í Nólsoy er blivin veruleiki, eftir at Ternan er farin at røkja farleiðina millum Havnina og Nólsoynna.

Og ja, nú skuldi eisini borið til at tikið ein hýruvogn í Havn heim í túnið í Nólsoy, um onkur kundi hugsað sær tað.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*